# Samstarva við barnarverndir í oynni



*Gøtu kommuna fer nú í samstarv um barnaverndarmál við fleiri av hinum kommunum í Eysturoynni*

**Gøta**: Á fundi mikukvøldið samtykti Gøtu bygdaráð at vera við í samstarvi um Barnaverndartænastu saman við fleiri øðrum kommunum í Eysturoynni – í hesum føri Nes-, Runavíkar-, Sjóvar - og Funnings kommunum.

Samstarvið byrjar 1. januar 2006 og er fyribils galdandi til 31. desember 2008.

- Í hesum samstarvi eru umleið 7000 fólk, og meta vit, at hetta er ein hóskandi stødd til tær uppgávur, sum barnaverndartænastan hevur sambært nýggju Barnaverndarlógini, sigur Gøtu kommuna.

Avtalan verður eftir ætlan endaliga undirskrivað av borgarstjórunum og landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum 15. september.

**sb.**

# Hugnaløta fyri kvinnur við krabba

**Krabbamein:** Í mars mánaði í ár varð ein nýggjur bólkur stovnaður undir Føroya Felag móti Krabbameini fyri kvinnur, sum hava ella hava havt krabbamein í undirlívinum.

Endamálið við bólkinum er m.a. at tær kunnu koma saman at tosa, stuðla og hjálpa hvørji aðrari og at veita hjálp til sjálvhjálp

Hesi bólkurin hevur skipað fyri hugnaløtum við jøvnum millumbilum, og nú hittast tær so aftur til eina slíka. Henda hugnaløtan verður í hølunum hjá Krabbameinsfelagnum í kvøld.

**sb.**

# Innbúgv til skúlan



*Skúlin í Hvalvík hevur nú fingið játtan til nýtt innbúgv*

**Hvalvík:** At hava børn gangandi í einum skúla, slítir sjálvandi uppá bygningin. Og tí er neyðugt av og á at keypa nýtt innbúgv til skúlarnar.

Tað er júst tað, sum Hvalvíkar skúli nú fær møguleika fyri. Á býráðsfundi herfyri var eitt mál til viðgerðar um eina eykajáttan til skúlan.

Skúlin hevði nevniliga biðið um eina eykajáttan uppá 30.000 kr. at keypa innbúgv fyri.

Fíggjarnevndin í Sunda kommuna tók undir við hesum uppskotinum, og tað gjørdi so bygdaráðið eisini einmælt, tá tað kom til atkvøðugreiðslu har.

**sb.**

# Stórmøti fyri stórum fólkaskara

**Um vikuskiftið var Ítróttarhøllin í Runavík karmur um stórmøti við afrikanskum talara. Sunnukvøldið vóru 1300 fólk á møti**

MØTIR
*Snorri Brend*



*Romain Zannou (hm) er prestur, men virkar eisini sum eitt slag av sendiharra fyri land sítt, Benin. Her verður hann tulkaður av Bergi D. Joensen á møti í Runavík leygarkvøldið*

**Runavík:** - Eg veit ikki, hvussu eg sjálvur hevði havt tað, um tað var eg sum var Abraham og eg skuldi offra son mín.

- Eg hevði helst bæði grátið, rópt og tárað, segði Romain Zannou í talu síni leygarkvøldið, har omanfyri 800 fólk vóru savnað saman.

Evnið hetta kvøldið var "At liva undir krossinum", og her nýtti hesin afrikanski talarin kendu frásøgnini úr Bíbliuni, tá Abraham í lýdni móti Gudi ætlaði at offra son sín, Ísak. Við hesum døminum vísti hann á týdningin at fylgja Gudi í lýdni, hóast tað kundi kosta rættiliga nógv at fylgja honum eftir og gera hansara vilja.

- Men við at fylgja hansara vilja og hansara ætlan, so verða vit so ríkiliga signað. Og tað besta er so tað, at hann hevur eisini lovað at verið við okkum í øllum tí, sum vit møta. Saman við Gudi ert tú ongatíð einsamallur, segði hann.

Romain varð væl tulkaður av Bergi D. Joensen av Argjum á møtinum hetta kvøldið, og sum eisini varð sent umvegis Rás 2.

Møtini byrjaðu fríggjakvøldið og hildu fram til sunnukvøldið. Mett verður at eisini 3000 fólk íalt vóru til tey trý stórmøtini.

## Prestur og sendiharri

Høvuðstalari á møtunum var Romain B. Zannou úr Benin. Hann hevur í nógv ár arbeitt sum prestur, og er í dag formaður í kirkjuni. Fleiri 100 prestar og onnur fólk starvast har.

Romain hevur sera gott samband við politikkarar og stjórnina í landinum, umframt í øðrum londum eisini. Hann virkar tí sum eitt slag av sendiharra fyri landið.

Romain hevur áður verið í Føroyum, har hann millum annað hevur havt fundir við løgmann, landsstýrismenn, politikarar eins og handilsfólk.

Hesaferð hevði so Heimamissiónin valt at skipa fyri stórmøtum við hesum talaranum um vikuskiftið. Íalt vóru eini 3000 fólk, harav flestu teirra vóru sunnukvøldið, tá ikki færri enn 1300 møtifólk vóru í Ítróttarhøllini í Runavík.



*Á møtunum var eisini høvi hjá fólki at ogna sær bøkur og fløgur. Sum sæst, so var gravgangur eisini eftir hesum*

# Ov grunt at sleppa inn

**Nú skal innsiglingin hjá bátunum í Kvívík gerast tryggari**

HAVNALAG
*Snorri Brend*

**Kvívík:** Fyri eini 20 árum síðani varð ein grótrúgva løgd á norðaru síðu á víkini. Men nú vísir tað seg, at partur av hesum grótinum er farið at ríða oman á botn. Hetta grótið er so líðandi farið yvir móti innsiglingini til havnalagið. Og hetta hevur so aftur ført við sær, at har er vorðið í grynra lagi hjá útróðrarbátunum at sigla inn og út, eins og størri suður hevur verið í sjónum.

- Vit vita eisini um at útróðrarbátar hava tikið í botn í innsiglingini orsakað av hesum. Og tað ynskja vit nú at sleppa undan, sigur borgarstjórin, Bøje Christensen við Sosialin.

Tað er Byggitek, ið byrjaði uppá hetta arbeiðið í farnu viku. Teir koma at brúka tvær vikur aftrat til at taka burtur grótið.



*Tað er ov grunt hjá bátunum at sleppa inn í innsiglingina í Kvívík. Nú verður bøtt um tað við at taka grótið burtur*

*Mynd: Jens Kr. Vang*